LØGTINGIÐ

## STJÓRI Í LØGTINGINUM

Starvið sum stjóri í Løgtinginum verður við hesum lýst leyst at søkja til setanar 1. november 2014, ella so skjótt sum til ber.

Uppgávur stjórans eru lýstar í § 22 í tingskipanini soleiðis:

Stjórin ella starvsfólk, sum hann tilnevnir til tað, hevur um hendi hesi størv:

- Undir ábyrgd formansins at skriva gerðabók Løgtingsins sbrt. § 74,
- er ráðgevi løgtingsformansins í øllum løgfrøðiligum og øðrum spurningum,
- er dagligur leiðari í umsiting Løgtingsins og setir í starv og loysir úr starvi starvsfólkini í umsiting tingsins,
- er skrivari hjá føroysku sendinevndunum við løgtingsmonnunum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum,
- er skrivari og løgfrøðiligur ráðgevi hjá løgtingsnevndum,
- ansar eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt, og
- er løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkunum og tingmonnum

Umsøkjarar eiga at hava løgfrøðiligt embætisprógv ella aðra viðkomandi útbúgving.

Tann, ið settur verður, skal hava leiðsluroyndir, og fyrimunur er at hava kunnleika til og/ella arbeiðsroyndir frá politiskum umhvørvi. Stjórin skal hava góð samstarvs- og samskiftisevni og hollan kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti, mál og mentan.

Starvið er lønt í 40. lønarflokki í tænastumannalógini við somu rættindum og skyldum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Tað er tó eisini møguligt at verða sáttmálasettur.

Umsóknir saman við møguligum ummælum skulu stílast til Løgtingsformannin og vera Løgtinginum att: Jógvan á Lakjuni, løgtingsformanni, Postrúm 208, FO 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. september 2014 kl. 15.30. Brævbjálvin skal vera merktur ”Umsókn”.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til løgtingsformannin ella Súsonnu Danielsen, stjóra.

*Løgtingið, 15. august 2014*

## Útbjóðing av kantinurakstrinum á Fróðskaparsetri Føroya

Fróðskaparsetur Føroya er ein útbúgvingarstovnur við umleið 720 lesandi og 110 starvsfólkum, sum húsast í 6 ymiskum bygningum í býnum og vit søkja nú eftir verti at reka kantinuna, sum er staðsett á Námsvísindadeildini, Frælsið 20. Kantinan veitir tænastu til næmingar og lærarar á Setrinum og á Venjingarskúlanum, eins og hon er opin fyri almenninginum.

Setrið hevur ynski um, at kantinan gerst savnandi miðdepilin fyri lesandi og starvsfólk, sum húsast í bygningum rundan um Námsvísindadeildina.

**Tann, ið fær ábyrgdina av at reka kantinuna:**
- veitir heilsugóðan mat til lestrarprísir
- røkkur øllum brúkarum á Setrinum

Veitarar, sum í umsókn síni greitt kunnu greiða frá, hvussu ætlanin er at reka kantinuna og røkka málinum um heilsugóðan mat til lestrarprísir umframt at røkka øllum brúkarum á Setrinum, hava fyrimun.

Eftir nærri samráðingar við áhugaðar umsøkjarar verður ein trý ára sáttmáli gjørdur ímillum partarnar, sum verður endurskoðaður árliga. Útveitingin kemur í gildi 1. september 2014 ella sum skjótast hareftir.

Freistin at lata tilboð inn er hósdagin 28. august 2014. Umsóknin skal sendast til Fróðskaparsetur Føroya, J.C. Svabos gøta 14, 100 Tórshavn.

Eru spurningar ella ivamál, kunnu tit seta tykkum í samband við Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóra, á teldupost: jorgenm@setur.fo, tlf. 292504.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
J. C. Svabos gøta 14 • Postrúm 272
110 Tórshavn • www.setur.fo

**Vitan er pallurin - forvitni er drívmegin**
Fróðskaparsetur Føroya er eitt universitet, har gransking og undirvísing eru kjarnin í virkseminum. Endamálið hjá Fróðskaparsetri Føroya er sambært løgtingslóg at inna gransking, geva frálæru á hægsta stigi og breiða út kunnleika um vísindalig úrslit og háttaløg.

Sosialurin 341800
in.fo
fyrst og fremst
www.in.fo

### PROKLAMA

Tey, ið hava krøv í búnum eftir Karin E.M. við Høgadalsá, Yviri við Strond 95, Tórshavn, 01.04.1944, deyð 04.11.2013, verða við hesum biðin um innan 3 mánaðir frá kunngerð av hesi lýsing at boða frá og skjalprógva krøv síni fyri undirritaðu.

Tikið er við skuld.

Krøv skulu gerast upp deyðadagin og sendast undirritaðu, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, vísandi til j.nr. 20140078 saman við frumriti av teimum skjølum, sum krøvini eru grundað á.

Tórshavn,
tann 14. august 2014
Fríða Patursson, adv.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

### PROKLAMA

Øll, sum hava krøv í búnum eftir Mary Sofie Thiana N. S. Egholm á Presttrøðni, Hoygarðsvegur 2, 370 Miðvágur, født tann 2. desember 1934, deyð tann 9. mai 2014, og fyrr deyða hjúnarfelaga Karmal Fredag á Presttrøðni, verða við hesum biðin um innan 3 mánaðar frá kunngerð av hesi lýsing at boða frá og skjalprógva krøv síni fyri undirritaða skiftirætti.

Tikið er ikki við skuld.

Krøv skulu gerast upp pr. deyðsdagin tann 9. mai 2014, og sendast advokat Páll Nielsen, Skansavegur 1, 100 Tórshavn, vísandi til sks.nr. 152/2014, saman við frumriti av teimum skjølum, sum krøvini eru grunda á.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR,
tann 14. august 2014.

### TROTABÚGV

Í trotabúnum Sp/f FK 326, Landavegur 54, 100 Tórshavn, skrás. nr. 3856, SKS 3-41/2014, verður einhvør, ið hevur krøv biðin um, skrivliga at venda sær til bústjóra, advokat Eyðbjørn Larsen, Advokatskrivstovan, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, j.nr. 20140385, innan 4 vikur eftir at hetta er kunngjørt, og boða frá hesum krøvum, uppgjørd við møguligum rentum á trotadegnum tann 28. mai 2014.

Skjalprógvan fyri krøvunum og makaskjal av fráboðanini skulu sendast við.

Tað verður innkallað til skiftifund hósdagin tann 18. september 2014 kl. 10:30, í skiftirættunum, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn, at royna fráboðaði krøv og møgulig onnur krøv. Ein listi við krøvunum og við tilmælum bústjórans og fráboðanum liggja til eftirskoðan í skiftirættinum 2 vikur innan skiftifundin.

Á fundinum kann búgvið verða endað sambært § 143, stk. 1, í konkurslógini.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR,
tann 15. august 2014.